# Fullkomiliga órímuligt

**Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen, heldur, at kravið hjá Føroya Jarðarráð um ein seyðasmogu undir vegnum til skjótibreytina í Sandvíkum er burtur úr vón og viti.**

FÚTABOÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í Sosialinum í gjár kom undan kavi, at Føroya Jarðarráð hevur mist tolið við Tórshavnar kommunu í samband við eina vegagerð til skjótibreytina í Sandvíkum í Havn. Sambært Jarðarráðnum er vegagerðin ólóglig, og tí er fútin boðsendur fyri fyri at steðga arbeiðinum. Formaðurin í Føroya Jarðarráð, Elisabeth Eldevig segði soleiðis um málið í Sosialinum í gjár:

- Vit bóðu Tórshavnar kommunu sjálvboðið steðga arbeiðinum alt fyri eitt, tí viðurskiftini millum okkum og kommununa eru ongantíð komin í rættlag, men arbeiðið helt kortini á. Tá kommunan sýtir fyri at steðga ólógligu vegagerðini, hava vit vent okkum til fútan fyri at steðga arbeiðinum við fútaforboði.

Okkum eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá borgarstjóranum, Jan Christiansen, um málið í gjár, men í dag gekk betur. Vit hava spurt borgarstjóran, hví Tórshavnar kommuna er farið undir at gera vegin, uttan at kommunan lýkur treytirnar hjá Føroya Jarðarráð.

- Eg haldi, at vit lúka treytirnar. Vit hava langt síðan keypt og goldið fyri jørðina, og tá arbeiðið var farið í gongd fáa vit at vita frá Jarðarráðnum, at ein seyðasmoga skal gerast undir vegin. Eg haldi, at kravið frá Føroya Jarðarráð er fullkomiliga órímuligt, tí eftir øllum landsvegnum úr Havn til Kvívíkar er ikki ein seyðasmoga, hóast nógvir seyðir eru kring landsvegin, heldur Jan Christiansen.

Hann leggur afturat, at tað kann ikki vera rætt, at ein landsvegur har 1000 bilar koyra dagliga kann klára seg uttan eina seyðasmogu, meðan ein vegur á 50 metrar, har kanska 20 bilar fara at koyra tvær ferðir um vikuna, skal hava eina smoðu.



*Eg haldi, at kravið frá Føroya Jarðarráð er fullkomiliga órímuligt, tí eftir øllum landsvegnum úr Havn til Kvívíkar er ikki ein seyðasmoga, hóast nógvir seyðir eru kring landsvegin, heldur Jan Christiansen.*

*Mynd: Savnsmynd*

Uttan mun um tú heldur tað er órímuligt krav, so er tað kortini ikki rætt, at tit byrja arbeiðið, uttan neyðuga loyvið frá Føroya Jarðarráð?

Eg fái ikki svarað spurninginum, tí eg havi ikki havt so nógv við málið at gjørt, er stutta svarið hjá Jan Christiansen.

Seinni hósdagin skuldu borgarstjórin og tekniska deildin á Tórshavnar býráð umrøða trætuna, sum er íkomin millum høvuðsstaðarkommununa og Føroya Jarðarráð, nærri.

## Føroya Bjór aftur besta jólaølið

Føroyska bryggjaríið, Føroya Bjór, hevur enn einaferð vunnið kappingina um besta jólabryggið í felagnum Selskab for Vestjysk Ølkultur. Í tíðindaskrivi frá Selskab for Vestjysk Ølkultur stendur skrivað, at seinasta fríggjadag smakkaðu limirnir í felagnum 15 ymisk sløg av jólabryggi, og eins og í fjør var føroyska jólabryggið frá Føroya Bjór valt til besta jólabryggið.

Nummar tvey gjørdist "X-Mas" frá Ceres/Thor og bryggjaríið Hancocks gjørdist nummar trý við "Merry Christmas".

**.páll**

# Lýsið ognirnar til sølu

Fólkaflokkurin heitir inniliga á Framtaksgrunnin um at lýsa ognirnar hjá felagnum til sølu alt fyri eitt. Flokkurin vísir til viðtøkurnar hjá grunninum:

Grein 2 stk 2: "fonden må ikke opnå bestemmende indflydelse i virksomheden" og í grein 2 stk. 3; Fonden skal afhænde foretagne investeringer, når disse har vist sig levedygtige og salgbare".

Fólkaflokkurin væntar, at verður hesi átøk tikin, kann grunnurin tryggja sær:

1. At at øll høvdu javngóðar møguleikar at bjóða upp á ognirnar
2. at best møguligur prísur fæst fyri hesa nú almennu ogn,
3. at tað neyðuga gjøgnumskygnið verður við søluni,
4. at kapping verður um føroyska feskfiskin, so minst møguligt fer óvirkað av landinum, og
5. at hetta er í tráð við viðtøkur grunnsins.

**.páll**

Halló. Halló
Hetta er Roderigo.
Vit søkka nú.
Vit fara runt nú.



Les meira í bókini **"Við úthavsins strendur"**, sum fæst um alt landið

merko JÓLAKALENDARIN

3-4. desember 2004

*Faxe Kondi 1,5 ltr.*



*11,95 + pant*

merko

*SUPER brokkoliblanding 1000 gr.*



*11,95*

merko

*Íslendskir lambsbøgir fyri kilo*



*31,95*

merko



SPURNINGUR

Hvussu eitur landstýrismaðurin í vinnumálum ?

Tilboðið er bert galdandi 3 og 4.desember

SVAR

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald. Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum



NAVN & TELEFON NUMMAR